# Fyrsti skúladagur í Kunoy



*Hóast Ivan ikki verður sjey ár fyrr enn í januar mánaði næsta ár, er hann longu farin í skúla. - Mær dámar væl at rokna, sigur hann. Her lurtar hann við áhuga eftir tí sum lærarin hevur at siga henda fyrsta skúladagin*

**SKÚLAGONGD**

*Orð & myndir: Snorri Brend*

Í gjár kl. 10 byrjaði skúlagongdin í Kunoyar skúla.

Í skúlanum eru seks næmingar, og ta fyrstu tíðina verður tað Jaspur Kruse sum fer at undirvísa teimum.

Millum næmingarnar er tann seks ára gamli Ivan Josephsen, sum byrjaði í 1. flokki.

***Í blaðnum í gjár høvdu vit eina reportasju frá hesum degnum. Tíverri vóru tekniskir trupulleikar við myndunum, og tí koma røttu myndirnar við í blaðið hesarferð.***

*Søren og Mette-bøkurnar eru enn á borðinum, tá danska málið skal lærast væl og virðiliga*



*Teir báðir elstu næmingarnir í 6. flokki sita saman. Tá skúlagongdin í heimbygdini er liðug, verður farið í skúla í Klaksvík*

